LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 10. juli 2014
J.Nr.: LUM-11- 14/00006-6
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit

viðvíkjandi klagu um innlit í upplýsingar útvegaðir til gerð av hagtølum

Við skrivi, dagfest 18. februar 2014, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> **"Kæra viðvíkjandi avgerð í Fiskimálaráðnum um at nokta alment innlit í prís á avreiðingum.**
> 14. november 2013 fekk undirritaði noktandi svar frá Vørn upp á eina umbøn um alment innlit í øll skjøl viðvíkjandi B. Grundgevingin var, at Vørn hevði savnað aktuella tilfarið til gerð av hagtølum og fremjing av almennum eftirliti. ...
>
> Sama dag kærdi eg hesa avgerð til Fiskimálaráðið, sum er fyriskrivaða mannagongdin, tá kærast skal um avgerðir hjá Vørn.
>
> 20. desember svaraði Fiskimálaráðið kæruni, har eg partvíst fekk viðhald: Vørn skuldi lata mær umbidnu upplýsingarnar, tá tað snýr seg um nøgd, slag og dato, men Vørn fekk viðhald í avgerðini um ikki at geva innlit í prís.
>
> **Og tað er avgerðin um at geva Vørn viðhald í hesum, sum henda kæran snýr seg um.**
> ...
> Eg kann leggja afturat, at eg ikki kann góðtaka, at nakrir upplýsingar - regulerir persónupplýsingar kanska undantiknir - kunnu metast sum privatir, tá teir bert eksistera sum ein beinleiðis avleiðing av umsitingini av lógini um vinnuligan fiskiskap. Skipið hevur nevniliga við støði í tí lógini fingið serrættindi til vinnuligt at troyta eina felags ogn. Fólkið eigur sambært lógini hesa ognina og má sum ánari hava rætt til at fáa **allar** upplýsingar, sum eru relevantar fyri at kunna kunna seg um og hava eftirlit við, hvussu ognin verður umsitin av myndugleikunum og handfarin av teimum, sum fáa serrættindi at troyta hana.
>
> Vørn er einasti almenni stovnur, ið hevur allar upplýsingarnar.
>
> Prísurin er sera relevantur fyri at hava eftirlit við, um alt gongur rætt fyri seg viðvíkjandi avrokningum av fiskalandingum - bæði við atliti til manningarnar sjálvar og við atliti til Taks.
>
> Afturat hesum vil eg gera vart við, at hóast ávísar ásetingar í lógini um alment innlit avmarka **rættin** til innlit, so merkir tað ikki, at innlit **skal** noktast."

Traðagøtu 43 · Postrúm 2008 · FO-165 Argir · Tlf 358500 · Faks 358501 · lum@lum.fo · www.lum.fo

## Málsgongd

Tann 20. desember 2013 sendi Fiskimálaráðið klagaranum soljóðandi kæruavgerð:

"**Avgerð í kærumálinum um noktandi innlit í skjøl viðvíkjandi avreiðingum hjá B**
Fiskimálaráðið hevur tann 14. november 2013 móttikið kæru viðvíkjandi avgerð frá Vørn, fiskiveiðieftirlitinum, dagfest 14. november 2013, um noktandi innlit í skjøl viðvíkjandi avreiðingum hjá B. Grundgevingin fyri at nokta innliti var, at umbidna tilfari er útvegað sum grundarlag til gerð av almennum hagtølum og fremjing av almennum eftirliti, ið ikki gevur rætt til innlit sbrt. §§ 10, nr. 5 og 13, stk. 1, nr. 4 í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina.

**Fiskimálaráðið hevur avgjørt at geva Vørn, fiskiveiðieftirlitinum viðhald í avgerðini um ikki at geva innlit í upplýsingar um prís, meðan avgerðin um ikki at geva innlit í upplýsingar um nøgd, slag og dato verður víst aftur til Vørn, fiskiveiðieftirlitið til nýggja viðgerð.**

Vørn, fiskiveiðieftirlitið hevur í telduposti tann 25. november 2013 upplýst, at Vørn, fiskiveiðieftirlitið hevur skilt upplýsingar í avreiðingar sum nøgd, prís, slag og dato.

Grundgevingarnar frá Vørn, fiskiveiðieftirlitinum eru tvinnar, tann eina er, at talan er um tilfar, sum er útvegað sum grundarlag til gerð av almennum hagtølum, ið rætturin til skjalainnlit ikki fevnir um, sbrt. § 10, nr. 5 í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina.

Fiskimálaráðið metir ikki, at upplýsingar um nøgd, slag og dato bert verða útvegað sum grundarlag til gerð av almennum hagtølum. Hesar upplýsingar verða nýttar til eftirlit og til skráseting av veiðu, herundir til at staðfesta, hvussu stóran part av tillutaðari kvotu fiskifarið hevur veitt. Tí metir Fiskimálaráðið ikki, at Vørn, fiskiveiðieftirlitið kann nokta innlit í upplýsingar um nøgd, slag og dato, vísandi til § 10, nr. 5 í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina.

Upplýsingar um prís á veiðini verða ikki nýttar í sambandi við fyrisiting av lóggávuni, sum Vørn, fiskiveiðieftirlitið fyrisitur. Hesar upplýsingar verða bert útvegaðar sum grundarlag til gerð av almennum hagtølum.

Sbrt. skrivi frá Vørn, fiskiveiðieftirlitinum, dagfest 21. november 2013, hevur Vørn, fiskiveiðieftirlitið viðgjørt spurningin um meirinnlit og kom til ta niðurstøðu, at meirinnlit ikki skuldi gevast, vísandi til atlitið til felagið.

Fiskimálaráðið metir ikki, at tað er grundarlag at seta til síðis avgerðina um ikki at geva meirinnlit, vísandi til at talan er um upplýsingar, sum bert verða útvegaðar sum grundarlag undir gerð av hagtølum og vísandi til atlitið til felagið, sum eigur fiskifarið.

Fiskimálaráðið gevur tí Vørn, fiskiveiðieftirlitinum viðhald í avgerðini um at nokta innlit í upplýsingar um prísin á veiðini hjá B.

Vørn, fiskiveiðieftirlitið grundgevur eisini fyri síni avgerð við at vísa til, at umbidnu upplýsingarnar eru útvegaðar til fremjing av almennum eftirliti, og at rætturin til skjalainnlit í slíkum førum kann avmarkast, vísandi til § 13, stk. 1, nr. 4 í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina.

Fiskimálaráðið skal viðmerkja, at sbrt. § 13, stk. 1, nr. 4 kann rætturin til skjalainnlit avmarkast í tann mun, tað er neyðugt til verju av munandi umhugsni viðvíkjandi fremjing av almennum eftirliti.

Fiskimálaráðið metir, at rætturin til innlit bert kann avmarkast sbrt. § 13, stk. 1, nr. 4 um so er, at tað eftir eini ítøkiligari meting verður komið til ta niðurstøðu, at atlitið til at fremja

eftirlit ger tað neyðugt at avmarka innlitið. Fiskimálaráðið dugir ikki at síggja, at tað er neyðugt at nokta innlit í upplýsingar um nøgd, slag og dato fyri at kunna fremja eftirlitið.

Tí hevur Fiskimálaráðið avgjørt at vísa aftur til nýggja viðgerð hjá Vørn fiskiveiðieftirlitinum spurningin um innlit í upplýsingar um nøgd, slag og dato.

Avrit av hesi avgerð er sent Vørn, fiskiveiðieftirlitinum til kunningar og umbøn um at taka upp til nýggja viðgerð spurningin um innlit í avreiðingarupplýsingarnar nøgd, slag og dato hjá B."

Tann 20. desember 2013 boðaði Vørn Fiskimálaráðnum frá, at avgerðin hjá Fiskimálaráðnum varð tikin til eftirtektar, og at klagarin fekk innlit í upplýsingar um nøgd, slag og dagfesting av avreiðingum hjá umrødda fiskifarinum.

**Partshoyring**

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 27. februar 2014, varð klagan send Fiskimálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Umboðsmaðurin heitti á Fiskimálaráðið um m.a. at greiða frá heimildargrundarlagnum fyri innsavnan av nevndu upplýsingum til hagfrøðiliga viðgerð, um hagfrøðilig viðgerð av upplýsingunum var farin og fór fram, um almannakunngerðing av hagtølunum, og hvørji endamál upplýsingarnar verða nýttar til. Samstundis varð Fiskimálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 21. mars 2014 sendi Fiskimálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

"**Viðvíkjandi klagu frá A, dagfest 18. februar 2014**
Víst verður til skriv tykkara, dagfest 27. februar 2014.

Fiskimálaráðið skal upplýsa, at heimildin til at innsavna upplýsingar til hagfrøðiliga viðgerð er § 32, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

Avreiðingarvirðini verða innsavnað eftir ásetingunum í kunngerð nr. 67 frá 16. mai 2012 um landingar og avreiðingar av fiski og fiskavørum. Tað eru § 6 og § 7 í nevndu kunngerð, sum áseta skyldu at lata upplýsingar um prís á veiðini.

Upplýsingarnar um avreiðingarnar verða óviðgjørdar latnar Hagstovu Føroya, sum stendur fyri viðgerð av grundupplýsingunum og almannakunngerð av hagtølunum.

Hagstova Føroya hevur upplýst okkum, at avreiðingarvirðir viðvíkjandi uppsjóvarfiski ikki hava verið almannakunngjørd á sama hátt sum avreiðingarvirðir fyri botnfisk. Orsøkin hevur m.a. verið, at tað bert hevur verið ein móttakari av uppsjóvarfiski í Føroyum, og at hagtølini ikki skulu upplýsa um einstaklingar ella virkir, umframt at tað hevur verið trupult at fáa rættar ella fullfíggjaðar upplýsingar um hesar avreiðingar. Hagstovan upplýsti, at nú tað eru fleiri móttakarar av uppsjóvarfiski, umframt at datagrundarlagið er blivið betur, arbeiðir Hagstovan við at fáa almannakunngjørt hagtøl um avreiðingarvirðir fyri uppsjóvarfisk eisini. Upplýst var okkum, at hetta kundi væntast almannakunngjørt um ein mánað ella so. Hagstovan arbeiðir við at finna út av, hvussu langt aftur tað ber til at fara.

Upplýsingar um avreiðingar verða eisini almannakunngjørdar á heimasíðuni hjá Vørn, fiskiveiðieftirlitinum. Tær upplýsingar, sum eru á heimasíðuni hjá Vørn, verða almannakunngjørdar óviðgjørdar. Viðvíkjandi avreiðingarprísum eru tað tó bert upplýsingarnar viðvíkjandi heimaflotanum, bólki 2- 6, sbrt. § 28, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, sum verða almannakunngjørdar. Skipið B er ikki fevnt av hesum bólkum.

Løgtingsins umboðsmaður biður Fiskimálaráðið greiða frá, hvørji atlit til felagið, sum eigur fiskifarið, Fiskimálaráðið hevur lagt dent á, tá tað í avgerðini verður sagt, at ráðið ikki metir grundarlag vera fyri at seta til síðis avgerðina hjá Vørn um ikki at geva meirinnlit.

Tá avgerð varð tikin í nevnda kærumáli gjørdi Fiskimálaráðið ikki eina meting av møguligum serligum atlitum til tað ávísa felagið, sum eigur B, sum kundu tala ímóti at geva meirinnlit. Fiskimálaráðið legði bert dent á tað yvirskipaða atliti, at tann, sum letur upplýsingar, sum eittans verða innsavnaðar til hagfrøðiligt endamál, eigur at kunna líta á, at upplýsingarnar bert verða almannakunngjørdar ella latnar øðrum í tí vavi, sum almennu hagtølini vísa.

Viðheft er frágreiðing frá Vørn, fiskiveiðieftirlitinum, dagfest 20. mars 2014 (*19. mars mín viðmerking),* telefonnotat frá 20. desember 2014 *(21. mars, mín viðmerking),* avrit av øllum skjølum í kærumálinum umframt skjalayvirlit.”

Frágreiðingin, sum Vørn, fiskiveiðieftirlitið, sendi Fiskimálaráðnum er soljóðandi:

“**Hoyringssvar**
...

**Heimildargrundarlagið fyri innsavnan av nevndu upplýsingum**
Heimildargrundarlagið fyri avreiðingarupplýsingum, sum verða latnir Fiskiveiðieftirlitinum, er §§ 6, 7 og 8 í kunngerð nr. 67 frá 12. mai 2012 um landingar og avreiðingar av fiski og fiskavørum.

Sambært § 6, skulu tey í Føroyum, sum keypa fisk ella fiskavøru í fyrsta liði, senda Fiskiveiðieftirlitinum upplýsingar um avreiðingina, herundir um prís fyri veiðina, sambært krøvum frá Fiskiveiðieftirlitinum. Upplýsingarnar skulu sendast elektroniskt í tí sniði og eftir teimum krøvum, sum Fiskiveiðieftirlitið ásetir og skulu sendast í seinasta lagi eina viku eftir, at fiskurin ella fiskavøran er keypt.

Sambært § 7, skal eigarin av fiskifarinum, tá fiskur ella fiskavøra frá fiski, veidd av fiskiførum undir føroyskum flaggi, verður seld í fyrsta liði til keypara uttanlands, senda Fiskiveiðieftirlitinum upplýsingar um avreiðingina, herundir um prís fyri veiðina, sambært krøvum frá Fiskiveiðieftirlitinum. Upplýsingarnar skulu sendast elektroniskt í tí sniði og eftir teimum krøvum, sum Fiskiveiðieftirlitið ásetir, og skulu sendast í seinasta lagi eina viku eftir, at fiskurin ella fiskavøran er seld.

Smbr. stk. 2, skal eigarin av fiskifarinum eisini, í seinasta lagi eina viku eftir, at fiskurin ella fiskavøran er seld, senda Fiskiveiðieftirlitinum skjal við kravdu upplýsingunum um avreiðingina sbrt. stk. 1, sum er váttað við undirskrift frá keypara uttanlands.

**Endamálið við savnan av umrøddu upplýsingum**
Endamálið við, at upplýsingarnir verða latnir, er, hvat nøgd viðvíkur, serliga eftirlit. Hvat prísi viðvíkur, er endamálið hagfrøðiligt. Nevnast kann, at kunngerðin greinar eisini, at Fiskiveiðieftirlitið kann krevja nærri upplýsingar hesum viðvíkjandi. Sostatt hava, sambært § 8, tey, sum taka ímóti fiski ella fiskavøru í sambandi við avreiðingar í Føroyum, og tey í Føroyum, sum keypa fisk ella fiskavøru í fyrsta liði, umframt fiskakeyparar og onnur, sum taka ímóti fiski ella fiskavøru, skyldu til, eftir umbøn, at lata Fiskiveiðieftirlitinum upplýsingar til hagfrøðilig og eftirlitsendamál.

**Hagfrøðilig viðgerð av nevndu upplýsingum**
Upplýsingar, sum verða latnir Fiskiveiðieftirlitinum sambært hesi kunngerð, verða nýttir til at hava eftirlit við nøgd, slag og tíðarskeiði, veiðan er veidd, so at metast kann um veiðan er lóglig. Prísir verða skrásettir, men verða sum so ikki nýttir, annað enn, at hagtøl hesum viðvíkjandi kunnu verða latnir eftir umbøn til granskingarendamál og hagtøl hesum

viðvíkjandi. Umframt hetta hevur Trygdargrunnurin beinleiðis atgongd til avreiðingarupplýsingar í talgildu skipanini. Tølini verða nýtt til at umsita krøv til grunnin, sum geldir minstuløn til manningar í føroyska fiskiflotanum.

**Almannakunngerðing av nevndu hagtølum**
Vørn hevur higartil valt at almannakunngera veiðiupplýsingar, eisini prís, viðvíkjandi veiði undir fiskidagaskipanini á heimasíðu stovnsins. Umrøtt hevur verið at almannakunngera veiðiupplýsingar fyri aðrar bólkar, harvið eisini B, men henda tilgongd krevur nakrar viðgerðir av upplýsingunum, og er tískil meiri tíðarkrevjandi. Hettar arbeiði fer tó møguliga at verða gjørt í framtíðini.”

Tann 21. mars 2014 hevur D, fulltrúi í Fiskimálaráðnum skrivað soljóðandi telefonnotat frá samrøðum við E, stjóra á Vørn, og F á Hagstovu Føroya:

“**Tosaði við E, stjóra á Vørn um telefon tann 20. mars 2014**
Eg spurdi um og hvussu upplýsingarnar verða latnar víðari til Hagstovu Føroya. E upplýsti, at allar avreiðingarupplýsingar verða latnar víðari til Hagstovu Føroya óviðgjørdar, harundir eisini avreiðingarvirðini fyri uppsjóvarveiðu. E upplýsti, at rádata viðvíkjandi øðrum bólkum er ójøvn. Nøkur virði eru fyri runda vekt, onnur fyri flak v.m. Um aðrar upplýsingar skulu almannakunngerast á heimasíðuni hjá Vørn, so má onkur viðgerð av grundupplýsingunum gerast. E metti tað ikki vera uppgávan hjá Vørn at viðgera grundupplýsingarnar, tað er Hagstovan, sum má gera hagtøl. Annars upplýsti E, at tað er F á Hagstovuni, sum vanliga tekur sær av hagtølunum viðv. fiskiveiðuni.

**Tosaði við F á Hagstovu Føroya um telefon tann 20. mars 2014**
F upplýsti, at avreiðingarvirðir fyri uppsjóvarfisk ikki vóru almannakunngjørd í hagtalsgrunninum hjá Hagstovuni. Orsøkin til at avreiðingarvirðini fyri uppsjóvarveiðu ikki vóru almannakunngjørd var, at tað hevði bert verið eitt virki, sum tók ímóti uppsjóvarfiski og Hagstovan kann ikki upplýsa niður á einkultpersónar ella virkir, umframt at tað hevði verið ringt at fáa rættar ella fullfíggjaðar upplýsingar. Tað hevði verið stór ósikkurheit í upplýsingunum um uppsjóvarveiðuna. Hetta er tó blivið nógv betur, og nú eru eisini fleiri móttakarar av uppsjóvarveiðu. F upplýsti, at Hagstovan fer at almannakunngera avreiðingarvirðini fýri uppsjóvarveiðu, væntandi verður hetta gjørt um ein mánað ella so. Hagstovan arbeiðir við at finna út av, hvussu langt aftur teir kunnu fara.”

Við skrivi, dagfest 25. mars 2014, vórðu viðmerkingarnar hjá Fiskimálaráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Av tí at umboðsmaðurin einki hevði frætt aftur frá klagaranum, boðaði hann pørtunum frá við skrivi, dagfest 5. mai 2014, at umboðsmaðurin fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

## Niðurstøða

Viðgerð mín av hesi klaguni snýr seg um, hvørt tað var rætt, tá Vørn, fiskiveiðieftirlitið (hereftir Vørn) sýtti eini umbøn um innlit í avreiðingarprísir hjá einum ávísum fiskifari í uppisjóvarvinnuni. Fiskimálaráðið viðgjørdi og staðfesti avgerðina hjá Vørn við teirri grundgeving, at upplýsingarnar um avreiðingarprísir vóru ikki fevndar av rættinum til innlit, tí tær vóru útvegaðar við einum hagfrøðiligum endamáli, jbr. § 10, nr. 5 í innlitslógini.

§ 10, nr. 5 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina) er soljóðandi:

“*Undantøka av øðrum skjølum*
**§ 10**. Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um

> ...
> 5) Tilfar, ið verður útvegað sum grundarlag til gerð av almennum hagtølum ella vísindaligum kanningum."

Henda regla er ætlað at tryggja tí almenna fullfíggjaðar og rættar upplýsingar, umframt at veita navngivnum privatpersónum og feløgum, sum lata upplýsingar til hagfrøðiliga viðgerð, vissu fyri, at upplýsingarnar verða viðfarnar sum trúnaðarupplýsingar. Eftir hagfrøðiligu viðgerðina kunnu hagtølini, sum vanliga verða almannakunngjørd í navnleysum líki, tó ikki undantakast, men eru fevnd av rættinum til innlit. Treytin fyri at undantaka skjøl eftir ásetingini er, at upplýsingarnar verða útvegaðar til hagfrøðilig endamál, og at ætlanin er at almannakunngera hagtølini.

§ 32, stk. 1 í lógini um vinnuligan fiskiskap (Løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars um vinnuligan fiskiskap við seinni broytingum) heimilar landsstýrismanninum at áseta, at m.a. upplýsingar um avreiðingar verða latnar til hagfrøðilig endamál.

§ 32, stk. 1 er soljóðandi:

> "**Kapittul 8**
> **Hagtøl v.m.**
> **§ 32**. Landsstýrismaðurin ásetur reglur um, at fiskiførum undir føroyskum flaggi og fiskakeyparum og øðrum, sum taka veiðu ella fiskavøru inn á goymslu, til umskipingar ella til at føra til avreiðingar uttanlands, verður álagt at lata inn veiðutøl, dagbøkur, vektarseðlar, upplýsingar um avreiðingar (*mín undirstriking)* og aðrar upplýsingar um fiskiskap til hagfrøðilig og eftirlitsendamál."

Í serligu viðmerkingunum til ásetingina, sum í upprunauppskotinum var § 33, er í Løgtingstíðindum 1993, bls. 396 um ta praktisku mannagongdina viðmerkt, at øll veiðitøl verða latin fiskiveiðieftirlitinum, sum síðani letur Hagstovuni tilfarið.

Við heimild í § 32, stk. 1 hevur landsstýrismaðurin í § 8 í kunngerð nr. 67 frá 16. mai 2012 um avreiðingar av fiski og fiskavørum ásett, at tey, sum taka ímóti fiski ella fiskavøru í sambandi við avreiðingar í Føroyum, og tey, sum keypa fisk ella fiskavøru í fyrsta liði, umframt fiskakeyparar og onnur, sum taka ímóti fiski ella fiskavøru, hava skyldu til, eftir umbøn, at lata Fiskiveiðieftirlitinum upplýsingar til hagfrøðilig og eftirlitsendamál. Í §§ 6, 1. pkt, og 7, stk. 1, 1. pkt. í somu kunngerð er skyldan at lata upplýsingar um avreiðingina, herundir um prís fyri veiðina, ásett.

§ 32 í lógini um vinnuligan fiskiskap og ásetingarnar í kunngerðini gera ikki mun á, hvørjar upplýsingar verða savnaðar til hagfrøðilig endamál, og hvørjar verða savnaðar til eftirlitsendamál. Tað má tískil gerast ein ítøkilig meting av, hvat upplýsingarnar um avreiðingar verða nýttar til. Verða upplýsingarnar nýttar til eftirlitsendamál, er talan um upplýsingarnar, sum myndugleikin hevur móttikið sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð, og tær eru tí í útgangsstøðinum fevndar av rættinum til innlit, jbr. § 4, stk. 1 í innlitslógini.

Sambært kæruavgerðini hjá Fiskimálaráðnum, dagfest 20. desember 2013, verða upplýsingar um nøgd, slag og dagfesting ikki bert útvegaðar sum grundarlag undir almennum hagtølum, men verða nýttar til eftirlit (fyrisiting), og tískil kunnu hesar ikki undantakast við heimild í § 10, nr. 5. Upplýsingar um prís á veiðini verða sambært upplýsingum í málinum hinvegin ikki nýttar í sambandi við fyrisiting av lóggávuni, men verða bert útvegaðar sum grundarlag til gerð av almennum hagtølum. Grundað á hetta meti eg upplýsingarnar hjá Vørn um avreiðingarprísir vera útvegaðar við tí endamáli at gera almenn hagtøl. Tað ávirkar ikki mína meting, at

Trygdargrunnurin, sum til umsiting og eftirlit hevur lógarásetta heimild at krevja allar upplýsingar frá myndugleikum, í verki hevur beinleiðis atgongd til talgildu skipanina hjá Vørn, har upplýsingarnar eru skrásettar.

Umframt at upplýsingarnar skulu vera útvegaðar til hagfrøðilig endamál, er tað eisini ein treyt fyri at undantaka skjøl eftir § 10, nr. 5 í innlitslógini, at ætlanin er at almannakunngera hagtølini eftir hagfrøðiligu viðgerðina. Sambært upplýsingunum frá Fiskimálaráðnum eru hagtøl fyri uppisjóvarfisk ikki almannakunngjørd. Sambært Hagstovuni, sum hevur um hendi hagfrøðiligu viðgerðina av upplýsingunum, kemst hetta av, at bert tað eina virki hevur tikið ímóti uppisjóvarfiski, og at Hagstovan kann ikki almannakunngera upplýsingar, sum eyðmerkja einstakar persónar ella virki. Hóast upplýsingarnar í ítøkiliga førinum sostatt ikki (enn) eru hagfrøðiliga viðgjørdar ella almannakunngjørdar, meti eg treytirnar fyri at kunna undantaka upplýsingarnar eftir § 10, nr. 5 vera loknar. Eg havi í hesum sambandi serliga lagt dent á, at vantandi almannakunngerðingin er grundað á, at upplýsingargrundarlagið hevur verið ófullfíggjað.

Klagað er eisini um, at Fiskimálaráðið staðfesti avgerðina hjá Vørn um ikki at lata meirinnlit í avreiðingarupplýsingarnar um prís. Sambært § 4, stk. 1, 2. pkt í innlitslógini kann ein myndugleiki loyva skjalainnliti, hóast skjøl og upplýsingar eru undantikin frá rættinum til innlit, um ikki annað fylgir av reglunum um tagnarskyldu v.m. Fiskimálaráðið staðfesti avgerðina grundað á yvirskipaða atliti til, at tann sum letur upplýsingar til hagfrøðiligt endamál, eigur at kunna líta á, at tær bert verða almannakunngjørdar ella latnar øðrum í tí vavi, sum almennu hagtølini vísa. Vísandi til at umbidnu upplýsingarnar, sum einans eru útvegaðar við einum hagfrøðiligum endamáli, knýta seg at einum navnsnevndum skipi og keypara, og at upplýsingarnar eftir umstøðunum ikki kunnu gerast navnleysar, havi eg ongar viðmerkingar til avgerðina um ikki at lata meirinnlit í upplýsingarnar um avreiðingarprísir.

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður